ítróttur

Nr. 176 • hósdagur • 18. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# KÍ føroyameistarar

**Kvinnurnar hjá KÍ hava fjórða árið á rað ognað sær gullmerkini í fótbóltslandskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fyrr í ár vann KÍ steypakappingina hjá kvinnum, og nú er so eisini staðfest, at liðið fjórða árið á rað kann rópa seg føroyameistari*

Tað er mest sum vorðin fastur siður, at tá tosað verður um kvinnufótbólt í Føroyum, so tosar tú um Í.

Soleiðis hevur eisini verið í ár, og tað kanska meira enn nakrantíð. Kvinnurnar hjá KÍ hava nevnliga verið fullkomuliga einaráðandi, og týskvøldið tryggjaðu tær sær so endaliga, at tær heldur ikki í ár verða tiknar.

Sum so hevur hendan staðfestingin bert verið ein spuringur um tíð, tí alt kappingarárið hevur tað ikki verið eitt av mótstøðuliðunum, sum hevur staðið teimum kurl á vøllinum.

Týskvøldið var so dystur á Toftum, eftir at upprunaliga ásetingin sunnudagin varð strikað av illveðrinum. Men týskvøldið bar betri til.

Tað var tó B68, sum byrjaði betri, og tær kundu eisini við eitt lítið sindur av neyvleika lagt seg á odda, tá tær tíðliga í dystinum fingu brotsspark.

Og tá vertirnir soleiðis ikki fingu gjørt sær dælt av sínum møguleikum, so var revsingin frá Klaksvíkini hørð. Fyri steðgin skutu tær tvey mál. Tað fyrra stóð Elsa Maria Simonsen fyri, og seinnu ferðina var Una Olsen upp á spæl eftir hornaspark.

Og so var einki at gera hjá B68. Eftir steðgin øktu Rannvá Andreasen, Annelisa Justesen og aftur Elsa Maria Simonsen til 5-0, áðrenn B68 fekk minkað um munin, men tað varð kortini KÍ, sum átti seinasta orðið, og aftur var tað Rannvá Andreasen, sum syrgdi fyri hesum. Við hesum seinasta sigrinum, hevur KÍ í 15 landskappingardystum skotið ikki færri enn 145 mál, meðan einans fýra mál eru farin inn hinvegin!

Og við sigrinum, so er tað ein staðfesting, at KÍ aftur verður meistari. B68 var annars einasta liðið, sum í teoriini hevði møguleika at røkka oddaliðnum, men tær mugu nú savna kreftirnar um at halda fast um silvurplássið.

Seinasti dysturin hjá KÍ verður leygardagin, tá tær fáa vitjan av HB, og eftir hetta verður aftur klárt hjá liðnum at taka ímóti FM-steypinum. Hetta er fjórðu ferð á rað og fimtu ferð íalt, at KÍ vinnur kvinnukappingina, men enn eru tær ikki mest vinnandi liðið í føroyskum kvinnufótbólti. Tað metið eigur HB framvegis, men við seks FM-heitum er nú bert eitt ár eftir, til KÍ hevur møguleika at koma ájavnt í hesum dystinum.

# Helst komandi mikudag

**Kappingarnevndin hevur enn ikki ásett, nær útsetti dysturin millum VB og GÍ skal spælast, men alt bendir á, at tað verður komandi mikudag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara at siga tað, tá nýggir leikdagar skulu ásetast, nú bert trý umfør resta í fótbóltslandskappingini. Nakað sum veðrið um vikuskiftið tó gjørdi neyðugt. Annar av dystunum, sum ikki varð avgreiddur sunnudagin, var tann í Vági, har GÍ var á vitjan.

Og meðan B68 og NSÍ avgreiddu sítt heingipartí mánadagin, so bar hetta ikki til í Vági. Vágbingar vildu fegnir spæla dystin kl. 18 tann dagin, men hinvegin vildu gøtumenn hava, at dysturin varð leiktur á miðdegi. Nakað sum vágbingar ikki vóru serliga áhugaði í. Ikki minst tí tað man vera avmarkað, hvussu nógvar áskoðarar ein slíkur dystur hevði savnað.

Tí varð dysturin av ongum ta ferðina, og so er spurningurin, nær dysturin skal spælast. Enn er hetta ikki endaliga ásett, men sum tað sær út í løtuni, so verður tað helst komandi mikudag.

Hetta tí tað bert er mikuog sunnudag, at GÍ kann sleppa hampuliga seint til Suðuroyar, og tað er neyvan hugsandi, at partarnir vilja avgreiða dystin fríggjadag, soleiðis at bert tveir dagar eru at hvíla seg í undan næsta dystinum.

Karl Vidtfeldt, kappingarleiðari hjá FSF, sigur, at enn er ásetingin ikki endaliga avgreidd, men at hetta helst verður gjørt ein av allar fyrstu døgunum.





# Føroysku súkklararnir vunnu í Íslandi



*Gunnar Dahl-Olsen gjørdist fremstur, tá føroyingar og íslendingar høvdu sett hvørjum øðrum grannastevnu*

**Føroysku súkklararnir eru júst komnir aftur úr Íslandi, har kappast hevur verið ímóti sterkastu súkklarunum í Íslandi. Koyrdar vórðu tríggjar kappingar, og samlaður vinnari gjørdist Gunnar Dahl-Olsen.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Ikki færri enn nýggju føroyskir súkklarar kappaðust í Íslandi í vikuskiftinum. Farið varð fríggjakvøldið við Atlantic Airways, og hópurin kom aftur mánadagin. Kappast varð í trimum kappingum, tvær landavegkappingar og ein einkultstartur.

Fyrsta kappingin á skránni var leygardagin, tá kappast varð í 60 km landavegkoyring. Leiðin gekk frá Reykjavík, nakað niðan í fjøllini har á leiðini, og so aftur á mál nakað eystanfyri Reykjavík.

Nógvir manns vóru til start, og allir fylgdust fyrstu nógvu kilometarnar í kappingini, men komnir nakað niðan í fjøllini stakk Gunnar Dahl-Olsen av frá feltinum. Bogi Kristiansen og íslendingurin Gunnlaugur Jonasson, royndu at koyra Gunnar inn aftur. Hetta eydnaðist bert partvís, tí tað eydnaðist bert Gunnlaugur at koyra Gunnar inn aftur. Hesir fylgdust tí meginpartin av túrinum aftur móti málinum.

Gunnlaugur var vælkoyrandi, og hann royndi tí fleiri ferðir at stinga av frá Gunnari á flata strekkinum aftur ímóti Reykjavík. Hetta eydnaðist ikki, og avgerðin fall tí ikki fyrr enn í endaspurtinum, sum Gunnar vann við bert einum sekundi.

Bogi Kristiansen er somuleiðis vælkoyrandi fyri tíðina, og honum eydnaðist tí at koma á mál sum triði maður.

Hjá føroysku unglingunum gekk best hjá Hans Krosstein, ið gjørdist nummar fimm í fyrstu kappingini.

Bergur Johansen kom á mál sum nummar sjey, og Dánjal Michaelsen var óheppin og fekk mekaniskar trupulleikar at dragast við, og gjøgnumførdi tí ikki fyrstu kappingina.

## Tættur endaspurtur á aðru etapu

Sunnudagin stóðu tvær kappingar á skránni. Fyrrapartin bleiv aftur kappast í landavegsúkkling, hesuferð 80 kilometrar. Kappingin fór fram við Tingvøllin og koyrast skuldi fýra umfør á umleið 20 kilometrar.

Javnt gekk tíðliga í kappingini og feltið fylgdist fyrsta umfarið, men nakað út á 2. umfar slitnaði feltið, og Eli Christiansen, Gunnlaugur Jonasson, Bogi Kristiansen og Gunnar Dahl-Olsen sluppi frá høvuðsfeltinum.

Hesir fylgdust líka til 100 metrar vóru eftir á mál, tá avgerðin aftur fall við einum sera spennandi endaspurti millum Gunnlaugur, Boga og Gunnar. Gunnar átti munin og vann við einari sponn á Boga Kristiansen, ið sostatt gjørdist nummar tvey.

Fyri at økja um spenningin høvdu fyriskipararnir lagt spurtir inn í kappingina, og møguleiki var tí at vinna sær eyka sekundir um tað eydnaðist einum at vinna spurtirnar á 1. og 3. umfari.

Gunnar var vælkoyrandi sunnumorgunin, og vann hann tí eisini báðar innløgdu spurtirnar, og tryggjaði sær harvið seks bonussekundir.

## Spennandi einkultstartur

Samlaði munurin millum Gunnar og Gunnlaugur var ikki stórur undan seinastu etapuni, og tí var spenningurin stórur, um hvørt Gunnar megnaði at halda tørn, og ikki missa ov nógva tíð í einkultstartinum.

Gunnlaugur er sera stinnur í einkultstartinum, og umframt at gerast nummar trý í einkultstartkappingini í Statoil Kring Føroyar fyrr í summar, gjørdist Gunnlaugur eisini íslendskur meistari 2003 í hesari grein fyri kortum.

Einkultstartkappingin fór fram á leiðini kring Grindavík, og koyrast skuldi 20 kilometrar.

Tá koyrt verður einkultstart koyrur hvør súkklari kapp ímóti "sær sjálvum" og klokkuni alt tað hann er mentur, og torført er tí at finna vinnaran fyrr enn allir eru komnir á mál. Sera javnt gekk millum sterkastu súkklararnar, men aftur seinnapartin sunnudagin gekk væl hjá Gunnar, og enn einaferð gjørdist hann skjótastur og vann sostatt einkultstartin. Trífalt gull til Gunnar, og tí gjørdist hann samlaður vinnari av kappingini.

Aftur hesuferð gekk væl hjá Boga Kristiansen, ið nú endaði á 3. plássi. Sverri M. Edvinsson, ið vanliga er sera sterkur í einkultstarti mátti noyðast við eitt 4. pláss.

Hjá unglingunum gekst best hjá Hans Krosstein og hesaferð gjørdist hann nummar fimm.

Bergur Johansen kom á mál sum nummar sjey og Dánjal Michaelsen sum 10. maður.



*Eisini Bogi Kristiansen gjørdi um seg á ferðini, og gjørdist hann nummar trý í samlaðu støðuni*

## Úrslitini hjá føroysku súkklarunum í Íslandi

**Unglingar:**

| | Samlað tíð | Plasering |
|---|---|---|
| Hans Krosstein | 4:24:53 | 5 |
| Bergur Johansen | 4:43:56 | 7 |
| Dánjal Michaelsen | 0:49:42 | |

**Menn:**

| | Samlað tíð | Plasering |
|---|---|---|
| Gunnar Dahl-Olsen | 4:25:46 | 1 |
| Bogi Kristiansen | 4:33:05 | 3 |
| Eli Christiansen | 4:40:06 | 4 |
| Sverri M. Edvinsson | 4:50:16 | 5 |
| Christian Guttesen | 5:04:21 | 7 |
| Esmar Joensen | 0:43:11 | |